Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum
(Framskundað stigvíst virðisgjald fyri ravmagnsbilar og vetnisbilar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 26 frá 27. februar 2023, verður § 3, stk. 3 orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Persónbilar, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum verða skrásettir í:

1) 2024, frá og við 1. apríl, skulu rinda 0% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum omanfyri kr. 200.000,
2) 2025 skulu rinda 7,5% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000, 11,25% í virðisgjaldi av virðinum millum kr. 100.000 og kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av virðinum omanfyri kr. 200.000,
3) 2026 skulu rinda 15% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000, 22,5% í virðisgjaldi av virðinum millum kr. 100.000 og kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av virðinum omanfyri kr. 200.000,
4) 2027 skulu rinda 22,5% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000, 33,75% í virðisgjaldi av virðinum millum kr. 100.000 og kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av virðinum omanfyri kr. 200.000, og
5) 2028 og fylgjandi ár 30% av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000 og 45% í virðisgjald av virðinum kr. 100.000 ella hægri."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 5. desember 2023 við 26 -0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 5. desember 2023

stjóri

LM-018/2023